# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Orðalagið hjá bretska forsætisráðharranum bøtir ikki um viðurskiftini okkara millum*
*(iranskur stjórnartalsmaður).*

# Blair hóttir við »øðrum tiltøkum«

**Bretska stjórnin er um at missa tolið við iranum. Teir 15 bretsku herflotamenninir skulu latast leysir alt fyri eitt**



*– Iranar eiga at skilja, at teir skulu lata tey 15 herflotafólkini leys alt fyri eitt, sigur Tony Blair*

– Eg vóni, at iranar duga at skilja, at teir eiga at lata tey 15 leys beinanvegin. Skilja teir tað ikki, at broytist støðan.

Tað sigur bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, sum tó ikki vil siga, at hann leggur í orðini, at støðan broytist. Ein talsmaður hjá stjórnini segði seinni, at verða tey 15 herflotafólkini ikki latin leys beinanvegin, fer Bretland at steðga samráðingunum við Iran um fangarnar, og harafturat fer Bretland at prógva, at tey 15 vóru í irakskum sjógvi, tá tey vórðu tikin.

Bretska stjórnin hevur gjørt greitt, at Iran hevur brotið altjóða lóg við at taka tey 15 herflotafólkini, tí tey eru ikki fangar, men burturflutt. Bretska stjórnin er eisini misnøgd við, at hon hevur fingið alt ov fáar upplýsingar um tey 15. Tað hevur ljóðað, at tey eru á einari iranskari herstøð, men hetta er ikki váttað, og í gjár kravdi bretska uttanríkisráðið, at bretskir embætismenn sleppa at tosa við tey 15.

– Vit royna tann diplomatiska vegin fyri at fáa tey leys, men vit góðtaka ikki, at okkara herfólk verða tikin í irakskum sjógvi, har tey eru við heimild frá ST. Røkkur diplomatiið ikki, verða onnur tiltøk sett í verk, sigur Tony Blair sambært Sky News.

## Stórur sáttmáli

Kina og Russland hava skrivað undir ein nýggjan handilssáttmála, sum sambært russiskum embætismonnum er verdur einar fýra mia. amerikanskar dollarar ella einar 22 mia. krónur. Sáttmálin er settur saman av 21 undirsáttmálum, sum snúgva seg um samhandil um málm, kol og olju. Eitt nú skal russiska oljufelagið Rosneft selja kinesarum brennievni til flogfør. Harafturat skulu kinesarar keypa nógv stál úr Russlandi. Tann nýggi handilssáttmálin millum Russland og Kina er komin í lag, nú kinesiski forsetin, Hu Jintao, er á vitjan í Moskva.

# Mintust ringastu flogvanlukkuna í søguni

**Í gjár vóru 30 ár liðin, síðani tvey flogfør stoyttu saman í floghavnini á Tenerife. Vanlukkan kravdi 583 mannalív**



Í gjár varð ein minnisvarði reistur við Los Rodeos-flogvøllin til minnis um tey, sum doyðu vanlukkudagin fyri 30 árum síðani. Tað er niðurlendski listamaðurin Rudi van de Wint, sum hevur gjørt hann.

Tað var tann 27. mars í 1977. Eitt Boeing 747-flogfar hjá amerikanska felagnum Pan American Airlines var á veg upp av vøllinum Los Rodeos á Tenerife, tá tað stoytti saman við eitt Boeing 747-flogfar hjá niðurlendska felagnum KLM. Tey flestui í teimum báðum flogførunum vóru amerikanarar og niðurlendingar. 583 teirra doyðu, og vanlukkan er tann ringasta í altjóða flogsøguni nakrantíð.

## STUTT SAGT

### Blóðugt stríð

Teir seinastu dagarnar hava harðir bardagar verið millum stjórnarherin í Demokratiska Lýðveldinum Kongo og hermenn, sum styðja fyrrverandi uppreistrarleiðaran Jean-Pierre Benba. Altjóða tíðindastovurnar hava ikki borið nógv tíðindi frá bardøgunum, men týski sendiharrin í Demokratiska Lýðveldinum Kongo, Karl-Albrecht Wokalek, segði í gjár, at bardagarnir høvdu kravt millum 200 og 600 mannalív. Tølini stava frá sjúkrahúsum og líkhúsum, segði sendiharrin, tá hann helt tíðindafund saman við sendiharrum úr øðrum ES-londum.

### Stríð um deyða bjørn

Ein deyð bjørn hevur elvt til eitt diplomatiskt stríð millum Týskland og Italia. Málið snýr seg um bjørnina Bruno, sum seinasta summar fór úr Italia til Eysturríkis og haðani til Týsklands. Har skutu nakrir veiðimenn hana, men tá hevði hon eisini beint fyri 30 seyðum og fýra kaninum. Men nú vilja italiumenn hava leivdirnar av Bruno, tí bjørnin helt upprunaliga til har. Men týsku myndugleikarnir siga nei, tí sambært týskari lóg hava teir lokalu myndugleikarnir í Suðurtýsklandi ognarrættin til leivdirnar av bjørnini, tí hon bleiv veidd har. Stjórnin í Berlin hevur roynt semju millum partarnar, men higartil til fánýtis, skrivar DPA.